UMHVØRVISMÁLARÁÐIÐ
Ministry of Environment

Tórshavn, tann 17. januar 2025
J. nr.: 25/00073-6
Viðgjørt: SDJ

**Javning av upphæddunum í arbeiðsskaðatryggingarlógini**

Sambært § 43 í løgtingslóg nr. 67 frá 25. mai 2009 um trygging móti avleiðingunum av arbeiðsskaða verða tær í § 42, stk. 6, § 57, stk. 2, og § 59, stk. 1, nevndu upphæddir javnaðar við broytingini í tí til eina og hvørja tíð galdandi høvuðssáttmála millum Føroya Arbeiðarafelag og Føroya Arbeiðsgevarafelag og avrundaðar til nærmastu 100 kr. Endurgjald, ið verður veitt sum framhaldandi árlig veiting sbrt. § 50, verður javnað á sama hátt.

Upphæddirnar verða javnaðar av landsstýrisfólkinum eftir tilmæli frá Vanlukkutryggingarráðnum.

Í brævi, dagfest 15. januar 2025, hevur Vanlukkutryggingarráðið mælt til, at nevndu upphæddir verða javnaðar soleiðis:

| | 1/1-2025 (5,74 %) |
|---|---|
| § 42, stk. 6 | kr. 514.500 kr. |
| § 57, stk. 2 | kr. 857.700 kr. |
| § 59, stk. 1 | kr. 210.100 kr. |

Landsstýriskvinnan skal boða frá, at tikið verður undir við tilmælinum, og at tær soleiðis javnaðu upphæddirnar verða almannakunngjørdar sbrt. § 43, stk. 2, í arbeiðsskaðatryggingarlógini, og at endurgjøld sbrt. § 50 verða javnað við sama prosenttali.

Vinarliga

Margit Stórá
Landsstýriskvinna

/ Pól Egholm